# Góðu vestmenningar

Eins og undanfarin ár verður fíggjarætlanin send hvørjum húski í bygdini. Vit vóna, at fíggjarætlanin kann geva tykkum eitt innlit í raksturin og íløgurnar hjá Vestmanna Kommunu í 2008.

Fíggjarætlanin fyri 2008 er væl hægri enn tann fyri 2007. Útreiðslurnar (íroknað íløgur) eru um 12 millión hægri, og inntøkurnar eru um 3 milliónir hægri. Íløgurnar eru 14,5 milliónir, hetta er nakað væl hægri enn í 2007. Tá vóru íløgurnar upprunaliga 6 milliónir; seinni vóru íløgurnar hækkaðar til 12,5 milliónir.
Undirskot er á fíggjarætlanini, tí íløgurnar eru so stórar. Undirskotið verður fíggjað við inniogn í peningastovnum.

Kommunuskattprosentið verður 22% eins og í 2007. Barnafrádrátturin verður somuleiðis óbroyttur - 3.500 kr. Barnafrádrátturin er millum teir lægru í landinum, men vit halda kortini, at barnafamiljurnar hava rættiliga góðar umstøður í kommununi – m.a. er foreldragjaldið í dagstovnunum millum tey lægstu í Føroyum.

Skuldin hjá Vestmanna Kommunu er í 2007 farin væl niður um eina álíkning. Tí hevur kommunan betri møguleikar at skipa síni fíggjarligu viðurskifti enn undanfarin ár.

Bygdarráðið samtykti 01.03.'07 at flyta røktarheimið av Fornlendi og út á Grønanes. Flytingin seinkaði byggingina nakað; farið verður undir røktarheimið í 2008.

Vit vóna, at ein partur av Niðara Vegi verður gjørdur í 2008.

Arbeiðið á Fjalsvegi verður liðugt í 2008. Akbreytin verður liðug í apríl, og laðingin fram við vegnum verður liðug í august.

Væl størri upphædd er sett á fíggjarætlanina til viðlíkahald og ábøtur á gøtur.

Kirkjugarðurin á Knúgvum er um at gerast ov lítil, tí hevur bygdarráðið samtykt at seta 1,5 milliónir í 2008 og somu upphædd í 2009 av til eina víðkan.

Ungdómshúsið er umvælt og nútíðargjørt, og leiðari er settur. Farið verður undir regluligt virksemi í 2008. Onkrar ábøtur verða eisini gjørdar á húsið uttan.

Væntandi verður avtala um vetrarfriðing gjørd á vári í 2008.

Nógv virksemi er í bygdini í løtuni, m.a. verður Fiskivinnuskúlin og frystigoymsla bygd. Bygdarráðið vónar, at gongd kemur á at gera miðstaðarøki í 2008, so at handils- og tænastuvinnan fær betri umstøður í Vestmanna.

Tað støðuga arbeiðið við at viðlíkahalda og útskifta vatnveitingina, at nútíðargera kloakkir, at skifta gomlu gøtuljóssteyrarnar út og at leggja streymføringar í jørð heldur fram.

**Gott nýggjár**